**Røða hildin fyri nýggja bú- og viðgerðarstovninum í Jegaragøtu**

**Góðu áhoyrarar,**

Tað fór sum eitt skot kring allan heim fyri neyvt 31 árum síðan í dag, tá ið tað fréttist at bretska tónleikaikonið John Lennon varð skotin í New York. Orðasnillingurin úr Liverpool er upphavið til nógvar sangskattir og hittinorðaði bretin náddi í sínum 40 ára langa lívi at borðreiða við nógvum vísdómsorðum. Stutt eftir, at Beatles fer í søguna í 1970 er John Lennon ørkymlaður og skal fóta sær aftur. Tá skrivar hann sangin "How", í tí sanginum er ein regla:

"How can I go forward when I don't know which way I'm facing?"

Umseta vit setningin til føroyskt, so spyr John Lennon, hvussu hann kann flyta seg frameftir, tá ið hann ikki veit, hvønn veg hann vendir. Vit, sum eru stødd her í dag fyri at hátíðarhalda nýggja bú – og viðgerðarstovnin í Jegaragøtu, høvdu ikki verið her, um vit ikki høvdu nakra hylling av, hvønn veg vit skulu.

Tað hevur gjørt tað nógv lættari og smidligari at seta ætlanir út í kortið, eftir at allir stovnarnir vórðu lagdir undir sama myndugleika. Økið er blivið lættari at samskipa, og tað kemur øllum pørtum til góðar. Ein sterkari samskipan við øllum stovnum undir einum myndugleika hevur við sær, at vit betri fáa gagnnýtt allar teir førleikar, sum eru í skipanini. Stóru vinnararnir av hesum eru starvsfólk, barnaverndartænasturnar og sanniliga børnini. Kjarnin í øllum átøkum eigur at vera at betra um umstøðurnar hjá teimum 14 børnunum og ungum, sum í løtuni eru i skipanini. Tað eru tey, tað snýr seg um.

Hátíðarhaldið í dag er enn eitt fet framá. Nýggi bú – og viðgerðarstovnurin her í Jegaragøtu letur dyrnar upp fyri fleiri møguleikum og tað fegnist eg um sum landsstýriskvinna. Men vit eiga at seta okkum bjartari mál. Felags fyri bú – og viðgerðarstovnarnir vit hava í dag er, at eingin bústovnur er bygdur til endamálið. Fyri at venda aftur til John Lennon, sála, so hevur hann einaferð sagt at:

A dream you dream alone is only a dream. A dream you dream together is reality.

Mín dreymur og visjón sum landsstýriskvinna er, at børn og ung við serligum avbjóðingum fáa enn betri umstøður at virka og mennast undir. Hóast eitt vælvirkandi fyribyrgjandi arbeiði, sum framhaldandi eigur at mennast, so verður tað altíð brúk fyri stovnstilboðum til børn og ung, tá fyribyrging ikki røkkur. Tað eigur at vera okkara mál. Tað er einki dulsmál, at eg sum landsstýriskvinna er av teirri greiðu áskoðan, at børn og ung við serligum avbjóðingum, sum hava tørv á at koma á stovn, í framtíðini eiga at sleppa á ein stovn, sum er bygdur til teirra tørv.

Eg skal vera tann fyrsta at ásanna, at tað er nakað á mál, áðrenn ein slík visjón ella dreymur kann gerast veruleiki, men vit, sum vara av økinum børn og ung eiga at stremba eftir hesum málinum. Skulu vit røkka málinum um at betra um bú- og viðgerðarumstøðurnar hjá børnum og ungum við serligum avbjóðingum, er neyðugt at vit taka nøkur tøka saman. Vónandi fer tað at lata seg gera.

Stóra takk fyri, at eg kundi sleppa at siga nøkur orð og enn einaferð hjartaliga til lukku við nýggja stovninum.

Annika Olsen, landsstýriskvinna í heilsumálum.